SÚKKLA TIL GENTU
Ein Mustang reyð og grá, 3 gear, stødd: 26.
Tlf. 318238/580595

SÚKKLA TIL SØLU
Sera væl viðfarin Kenton dreingjasúkkla, 7 gear, fyri 1.000,-
Tlf. 317451/215064

70ccm YAMAHA NEO´S
Til sølu ella umbýting við ein annan skutara. Skutarin er top tunaður, men manglar bara tun útstoyt og NR.plátu.Allir orginalir deilir fylgja við. Skutarin er uml. 8 ár. og koyrt 12607 km. Við tun deilum hevur hann bara koyrt uml. 800 km.
Tlf. 261192

Teldur

SUPER SPÆLITELDA
19' skerm bíliga til sølu. Við Athlonxp 2200 + prosessara, 512 MB ram, eitt spildurnýtt Geforce 5 seria grafikkort, ein 80 GB harddisk og ein 19' CRT skerm og annað til sølu. ring ella smsa á
Tlf. 265008 ella 322388

ÓBRÚKT
P. H. Pavilion Teld til sølu 80 G (7200 o/m) 512 MB, DVD-brennari 16x, Sis Mirage2 grafikkort, Windows XP Home, til sølu fyri 7.000,-
Tlf. 262427

TELDUSPØL TIL SØLU
Total Club 2004 og 2005, FIFA 2003 og 2005, og Grand Theft Auto Vice City og UEFA 2004, 150 kr. stk.
Tlf. 319223 ella 257920

TELDA TIL SØLU
1,5 GHz prosessor, 256 MB-ram, 40 Gb harddisk, brennara. Teldan er í góðum standi og selist uttan skerm og hátalarar. Nógv program fylgja við. Prísur 2.500,-
Tlf. 585555

TIL SØLU
Ein Playstation I við 8 spølum, 1 joystick og 1 memorycard til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 258411

TIL SØLU
Ein DVD og ein Playstation 1 við 5 spølum til sølu.
Tlf. 318238/580595

ROUTER
D-Link 4-Port Ethernet Router. Kan bruges sammen med El&Tele bredbånd. Pris 200,- kr. Linksys Trådløs 4-ports router. Kan bruges sammen med Kall og FT. Kun én måned gammel. Pris 700,- kr.
Tlf. 581984

ER TAÐ NAKAR
sum eigur SIMS 1 telduspælið at selja mær?
Tlf. 315047

PLAYSTATION II
við spølum sum Granturismo 4, Need for speed, Underground, Fifa 2005. Til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 255089

Tónleikur

B&O 5000 STEREOANLEGG
(plátuspælari, bandupptakari, forsterkari/tunari,master control panel) við Jamo gólvhøjtalere til sølu fyri 1000 kr. tilsamans. Viðmerkjast skal at bandupptakari og forsterkari/tunari eru partvís defekt.
Tlf. 322432

BILHÁTALARAR
Tvey pør, óbrúkt, spildurnýggir bilhátalarar Pioneer 150W bíliga til sølu.
Tlf. 503074/421034

HEIMASTUDIO
Boss br-1600 16 spor, harddisc recordari, til sølu fyri 7.500 kr.
Tlf. 421419

SUBBASSAR
Tveir Subbassar við 18' hátalarum, 600 watt, til sølu.
Tl. 421419

GUITARKABINET
Marshall, 2x12' Celestion hátalarar, 16 ohm stereo eæææ 8 ohm mono, til sølu fyri 1800 kr.
Tlf. 421419

STUDIOHÁLARARAR YNSKJAST
Hevur tú eitt sett av studiohátalarum at selja mær, so ring ella skriva til mín á david@godsv.net
Tlf. 222797 Dávid

TVØRFLOYTA
ynskist til keyps.
Tlf. 451014

BASS-SETT
Ibanez-bassur, Behringer 60W forsterkari, taska, reim og stativ til sølu fyri 2.900 kr. Settið er 1/2 ár og er sum spildurnýtt.
Tlf. 265070, eftir kl. 18

Út- & Sjónvarp

TIL SØLU
Eitt gamalt sjónvarp av slagnum Philips fyri 400 kr.
Tlf. 518405

HYGG ÚT Á
> www.tpi-foeroyar.dk < Her alt innan foto-útgerð digitalt at fáa. Sera lágir prísir
Ring 272908

STEREOANLEGG
við bæði hátalarum og plátuspælara bíliga til sølu.
Tlf. 421074/503074

Ymiskt

LUFTMADRASSUR
2 nýggjar luftmadrassur 200 x 85 bíliga til sølu og 2 springmadrassur 200 x 90 heilt bíliga.
tlf. 313799

FRÁ VÁGS KAPPRÓÐRARFELAG
Hesi nummuruni hava vunnið á lutaseðlum hjá VK.
1.Silvur til føroyskan búna frá Tórgerð Suðuroy 1826.
2.Lamb til heystar 1021.
3.El-sláturspæl frá D.J.Vilhelm 982.
4.Ferðataska frá Heimavirkinum 1226.
5. Borðlampa frá Gudmund Larsen 1937.
6. Gávokort á kr. 500,- til eina av Statoilstøðunum 1919.
7. Døguriði fyri tvey á Hotel Bakkin 1917.
8. Gávukort á kr. 500,- frá Litaval, Vágur 2116.
9.Taska við gávulutum frá Ellen Dahl 1005.
10.Gávukort á kr. 500,- frá Skóbúðini hjá Solveig 2179.
11. Lampa frá El & Automatikk 2101. Vinningarnir kunnu heintast við at ringja á tlf.373299, 573299 ella 254799. Takk fyri stuðulin.
tlf.373299, 573299 ella 254799

HONDBÓLTSGENTUR Í KEYPMANNAHAVN
Til allar hondbóltsgentur í Keypmannahavn. Venjingin byrjar mikudagin 14. sept kl. 19.00-21.00 í Grøndalscentrinum, Hvidkildevej 64, 2400 København NV. Vinarliga
ÍF Føroyar hondbóltur - kvinnur

TIL SØLU
Grunøkið á 481 fermetrar til støddar, liggjandi í friðarligum umhvørvi mitt í býnum til sølu um hóskandi boð fæst. Áhugað kunnu ringja
tlf. 457455 ella 217455 eftir kl. 17

PRESENDING
10 m.long og 3m. br. til sølu. 57 reinsað seyðahorn til sølu. 350 tlf. kort, mest talitíðarkort til sølu.
Tlf. 270427

BYRSA TIL SØLU
Ein 12 kal. Mossberg pumpgun til sølu fyri 3.000 kr. sum nýggj.
Tlf. 262901/313993

MIÐVÁGS BÓLTFELAG
MB 100 ára veitslan verður 29. oktober kl. 19.30. Nærri verður lýst seinni.
Nevndin

LOPPUMARKNAÐUR
verður í Tórsbyrgi leygardagin 10. september kl. 10.00. Umframt mangt annað, verða skógjarðber og aðrar smáplantur til sølu.
Eigarafelagið á Tórsbyrgi

TIL SØLU
Super Star 3600 sendari til sølu fyri 2.500,-kr.
Tlf. 271723

TIL SØLU
DVD filmur »Mellem venner« til sølu fyri 70,-
Tlf. 271723

2 BOGAR TIL SØLU
1 Hoyt. 1 Win & Win fyri hálvan prís.
Tlf. 221168

TIL SØLU
Ein 500 m Cannon tele-Autofocus-L til sølu.
Tlf. 221168

»KANNINGIN« AV FØROYSKUM HANDVERKI
Til tykkum, ið hava móttikið spurnarblað, vinaliga sendið tað aftur skjótast - svarað ella ósvarað.
Heilsan Randi og Jónhild / Føroya Heimavirkisfelag

SÍLAVEIÐA Í NESVATNI
Higartil í ár eru fiska uml. 90 síl. Tað største vigaði 6 kg. og var 78 cm. langt. Fleiri eru eftir enn. Nærri fæst at vita á
Tlf. 447565 ella 260887

TIL SØLU
Tvær gardinur til sølu. Ein persienna b: 85xh:55 kirsuber breiðar fyri 150 kr og ein Hør fallgardina b: 85xh:120 fyri 300 kr.
Tlf. 310962-554525

GAMLAR MYNDIR
verða viðgjørdar. Sí meira á: http://www.sel.fo/ShowItem.aspx?Id=760
Ella ring á tlf.nr 272908

LOPPEMARKET
i kælderen hos Ivan og Anita, Gjógvarabø. Nye kurvemøbler, hynder, computer ting, masser af både nye og brugte ting til meget billige penge. Bl.a. rundt marmor/kurve spisebord med 6 stole/kurve, aldrig brugt nypris 8.000,- vi tager blot 1.800,- Icethe caffe køleskab med glaslåge og meget meget mere. Kom og kik. Døren er åben hos Ivan og Anita Poulsen, Vágur.
Tlf. 272672

AVHEINTINGARTILBOÐ: 2.000 KR.
6 stk. vippuvindeygu 1,19 x 1,19. 3 stk. vippuvindeygu 1,19x1,49 (hxb). 3 stk. føst vindeygu 0,39x1,49 (hxb).
Tlf. 211161/310161

FERÐASEÐIL
til Keypmannahavn 22. sept. og heimaftur 1. oktober. Til sølu fyri 2.500,-
Tlf. 317367/221776

KØKSKRANI
Nýggjur óbrúktur køkskrani til sølu fyri 450 kr.
Tlf. 312968

TIL SØLU
er ein Kenwood DMF 3020 minidisk spæl- og upptakari fyri 2000 kr. Er lítið og einki brúktur. Nýprísur 4.100 kr.
Tlf. 221826

SUN FIE DUO 100 W
6 stk. rør til sól til sølu.
Tlf. 265290

IP-TELEFON
Grandstream BT-101 telefon. Sort. Pris 750,- kr.
Tlf. 581984

KANN AVHEINTAST
Hvítt baðikar, sum nýtt, ringið áðrenn.
Tlf. 317451/215064

ÓBRÚKT VENTILATIÓNSANLEGG
til sølu. Nýprísur 20.000,- Ring og hoyr nærri á
tlf. 312530

FLYTA UTTANLANDS?
Vit kunnu taka flytigóðs við, sera bíliga. Koyrt verður frá hurð til hurð. Vit ferðast við Norrønu.
Ringið 213223

TIL SØLU
Ein »skaftivevur« og eitt renniborð fyri 3.500,- kr.
tlf. 311752/211752

BRIDGE
Opið hús hóskvøld kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Havnar Bridgefelag

Ein kristin kriminalsak

FØROYSKA SJÓMANS-PRESTASTARVIÐ

Essayistur Ólavur Rasmussen

5. partur

Eg setti mínum starvsfelaga stevnu, og vit hittust í prestagarðinum hjá viðkomandi. Presturin var ógvuliga blíður, hetta var ein góðan sólksinsdag, og drukku vit kaffi uttanfyri. Vit høvdu góðar stundir at práta. Presturin visti avbera væl, at eg var alt annað enn nøgdur við sáttmálan, sum nevndin hevði undirskrivað, men hetta var hóast alt bara ein ósemja um eina sak, og hevði einki við persónligu viðurskiftini okkara millum at gera.

So bar eg upp míni ørindi. Segði sum var, at eg eri av G slagnum í Gøtu, stóra G væl at merkja, ikki av næstu skyldmonnunum hjá Tobba fyri einki, og eri bersøgin av lyndi, hóast hjartað er bleytt. Segði við prestin, at eg trívist best millum menniskju, sum eg veit hvar eg havi, og tí fór eg at leggja kortini á borðið; eg var ikki komin at seta krøv um nakað sum helst, tí at ein og hvør, sum søkir eitt starv, má fyrireika seg til ikki at fáa tað. Men eg var í eini serstøðu júst í hesum máli, og tí vildi eg staðiliga hava viðkomandi at siga mær, opið og erliga, um hann ætlaði at stuðla mær, tí, um hann ikki gjørdi tað, so fór eg at taka umsóknina aftur og mæla nevndini til einmælt at innstilla Andrias Andreasen, tí at so sat danska sjómanskirkjan í eini ringari støðu, hóast eg, sum longu sagt, visti, at Andrias var fullkomiliga avskrivaður.

Presturin var ikki í iva; hann skilti væl mína støðu, segði eisini, at uttan mín leiklut var einki sjómannsprestastarv yvirhøvur, og bað endiliga lata umsóknina standa við, tí at tann nýggja sjómanskirkjan hevði brúk fyri eini effektivari byrjan. Eg endurtók, at tað var ógvuliga umráðandi fyri meg, at hann segði mær sannleikan, og avdúkaði tað stóra loyndarmálið hjá donsku sjómanskirkjuni, og legði honum eina við, at tað eru pengar hjá føroyska skattgjaldaranum og okkara siglandi fólki tað snýr seg um, og ikki ein kyniskur glæntrileikur hjá Ronald Pedersen og Claus Harms.

Presturin bað meg fara suðuraftur í góðum treysti um, at málið fór at fáa ein bjartan enda.

Kvøldið eftir var innstillingarfundur og einaferð noyddist eg at ásanna, at starvsfelagin, sum dagin fyri hevði róst mær fyri míni avrik í samband við sjómannsprestastarvið, bara hevði slongt mær okkurt uppí andlitið.

Tá ið úrslitið av innstillingini fyrilá, vóru tvær atkvøður fyri mær og tvær fyri Andriasi. Tað stóð á jøvnum. Hetta var sjálvandi ein skítbýtt støða, sum ongastaðni hoyrir heima í eini so týdningarmiklari nevnd. Heilt út av lagi óprofessionelt, og uppaftur meira óprofessionelt handlaði nevndin, tá ið hon avgjørdi spurningin við lutakasti, sum um tey spældu ludo. Nevndin visti fullvæl, at alt uttan einmælt innstilling, annaðhvørt av mær ella Andriasi, var at geva málið upp til skutils, so at Ronald og Claus kundu hóreiggja sær akkurát sum teir vildu. Nevndin kendi nevniliga eisini loyndarmálið.

Ùrslitið av lutakastinum var, at Andrias varð innstillaður sum nummar eitt, undirritaði sum nummar tvey. Eftirsum at nevndin skuldi vera fitt móti øllum innstillaði hon Hjørdis sum nummar trý. Enn einaferð vórðu terningarnir kastaðir beint í føvningin á donsku sjómanskirkjuni, sum straks gjørdi sær dælt av støðuni.

Eg gjørdist so illa við av løgna atburðinum hjá mínum starvsfelaga, at eg umgangandi sendi skriv til nevndina, og gav boð um, at mín umsókn ikki skuldi teljast við, og heitti eg á nevndina um at stuðla Andriasi.

Innstillingin úr Føroyum varð send donsku sjómanskirkjuni. Andrias var einsamallur nummar eitt, og einasti føroyingur, við royndum í Føroyum og á sjónum, sum nú var at velja ímillum.

Men eg visti betur. Danska sjómanskirkjan fór ongantíð at seta Andrias í starvið í Hull, hóast tað onga aðrastaðni í ríkinum hevði komið fyri, at ein umsøkjari til eitt prestastarv, sum er innstillaður sum nummer eitt, og har næsti maður hevur tikið seg aftur, við fullum stuðli til tann fyrstvalda, ikki hevði fingið starvið.

Ólavur Petersen, skyldmaðurin, hevur skrivað ein hóp um hetta mál í føroyskum bløðum, serliga við atliti at Andriasi. Eg havi, av ávísum prestum í Føroyum, verið lagdur undir at standa aftanfyri hesa skriving, at hava verið tann, sum hevur løtt, meðan navnin hevur skotið. Aðrir prestar hava gitt, at tað er høgravongurin í føroysku prestastættini, sum stendur aftan fyri skrivingina hjá Ólavi Petersen. Fyri mítt egna persónliga viðkomandi kann eg bara siga, at tað liggur mær so ómetaliga fjart at krógva mínar meiningar aftanfyri aðrar persónar.

Tesan hjá Òlavi Petersen er, at tað er Jógvan Fríðriksson, sum er tann stóri skurkurin í spælinum, og at hann hevur misnýtt sítt vald sum formaður í nevndini fyri føroysku sjómanskirkjuni, til tess at forða fyri, at Andrias fekk starvið sum sjómansprestur í Hull.

Eg eri ikki bara ósamdur við Ólavi Petersen í hesum harða dómi, men kann enntá prógva, at tað er einki hald í hansara álopum á Jógvan. Men nú kemur undan kavi tann veruliga bumban, sum hevur minst líka so stóra spreingiløðing sum bumburnar hjá skyldmanninum inni á Langanesi.

Ein bumba, sum rakar bæði ta føroysku og ta donsku sjómanskirkjuna og mentamálaráðið, væl at merkja um partarnir ikki eru líkaglaðir. Eg tosi um tað stóra loyndarmálið hjá donsku sjómanskirkjuni.

Andreas Andreasen varð við lutakasti innstillaður sum nummar eitt av nevndini í føroysku sjómanskirkjuni. Ólavur Rasmussen visti longu tá, at hann ongan livandi møguleika hevði at fáa starvið í Hull